


# Jarðfeingi tørvar jarðfrøðing til at marknaðarføra landgrunn

Deil:

**Jan Müller**

27.07.2014 - 23:21

Oljan.fo

Landsstýrismaðurin í oljumálum, Johan Dahl hevur fleiri ferðir seinastu tíðina sagt frá, at hann ætlar at leggja størri dent á at marknaðarføra føroyska landgrunnin fyri at fáa útlendsk oljufeløg at vísa størri áhuga fyri leiting á landgrunninum.

Nú hevur so Jarðfeingi tikið eitt stig á hesi leið við at lýsa eftir jarðfrøðingi til at arbeiða við landgrunninum.

Á heimasíðuni skrivar Jarðfeingi m.a., at eitt starv sum jarðfrøðingur er leyst at seta frá 15. september 2014 ella skjótast til ber. Talan er um tíðaravmarkað starv.

Setanin er á kanningardeildini. Her kemur viðkomandi at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi. Uppgávurnar fevna um at savna, tulka og viðgera kanningarúrslit frá føroyska landgrunninum við atliti at marknaðarføring av føroyska landgrunninum.
Umsóknir skulu vera Jarðfeingi í hendi í seinasta lagi 15. august 2014. Adressa: Jarðfeingi, Postboks 3059, FO-110 Tórshavn.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hera Ziska, deildarleiðara:hziska(kurla)jardfeingi.fo